# Forkunnug útimissiónsstevna í Nesvík

**Farna vikuskifti luttóku 150 fólk á útimissiónsstevnu í leguhúsinum í Nesvík, sum Heimamissiónin skipaði fyri. Nógv ymiskt var á skránni, og møtisalurin var mestsum fullsettur til møtini um kvøldarnar**

ÚTIMISSIÓNSSTEVNA
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Heimamissiónin skipaði í vikuskiftinum fyri útimissiónsstevnu í Nesvík. Evnið fyri allari stevnuni var útimissión, og fyriskipararnir høvdu gjørt nógv burturúr at fáa umhvørvið til at stuðla boðskapinum. Forhøllin í leguhúsinum var prýdd við øllum møguligum forkunnug um úr ymiskum londum, sum føroyskir trúboðarar eru í. Millum annað stóð eitt modell av einum afrikanskum stráhúsi mitt á gólvinum.

Ymsir felagsskapir høvdu básar í forhøllini, millum annað YWAM og OM, og tríggjar uppvørpur stóðu í hvør sínum horni. Har vóru vístar myndir frá føroysku trúboðarunum í teimum ymsu londunum, og eisini var kunning um, hvørji fólkasløg ikki hava hoyrt boðskapin um Jesus.

## Forkunnugur døgurði

Leygardagin var forkunnugur døgurði við rættum úr Afrika og Ukraina. Fólk vóru biðin um at vaska hendurnar áðrenn máltíðina, tí at tey skuldu eta við fingrunum. Eisini vóru áhugatímar á skránni, har ið millum annað fyrrverandi og núverandi trúboðarar undirvístu.

Thormod Engelsviken talaði til møtini, sum vóru um kvøldarnar. Seinni á kvøldunum vóru ungdómstiltøk við lívligari sangi og framførlsum. Leygarkvøldið høvdu tey ymisku toymini, sum vóru úti í summar, framløgu við livandi myndum. Millum annað greiddu umboð frá tí eftirhondini landskenda Ísraelstoyminum frá túrinum, har ið tey endaðu mitt í einum stríði millum ísraelsku stjórnina og Hizbollah.

Les meira um Útimissiónsstevnuna á síðu 16.



*Leygardagin var forkunnugur døgurði við rættum úr Afrika og Ukraina. Fólk vóru biðin um at vaska hendurnar áðrenn máltíðina, tí at tey skuldu eta við fingrunum. Her eru tað trúboðararnir Jórun og Nurlan Malaikev, sum njóta døgurðan saman við soninum og foreldrunum hjá Jórun. Jórun og Nurlan arbeiða millum gøtubørn í Kiev í Ukraina.*
*Mynd: Frants Jensen, Trúboðin*



*Forhøllin í leguhúsinum var prýdd við øllum møguligum forkunnug um úr ymiskum londum, sum føroyskir trúboðarar eru í. Millum annað stóð eitt modell av einum afrikanskum stráhúsi mitt á gólvinum.*
*Mynd: Frants Jensen, Trúboðin*

Hagstova Føroya er sjálvstøðugi hagtalsstovnur landsins. Stovnurin er í trimum deildum - Hagtalsdeild, KT-deild og Útgávudeild, sum samstarva um at veita almenninginum góð og skjót hagtøl um so nógv viðurskifti sum til ber. Á stovninum arbeiða 15 fólk - búskaparfrøðingar, samfelagsfrøðingar, KT-tøkningar og skrivstovufólk.




INFORMASJÓNSSTARV Á HAGSTOVUNI

EIN HEIMASÍÐA VIÐ INFORMASJÓN UM ALT SAMFELAGIÐ - ER TAÐ NAKAÐ FYRI TEG?

Hagstovan sóknast eftir einum fólki, sum skal vera við til at útgeva hagtøl og informasjón um samfelagið á heimasíðuni hjá okkum www.hagstova.fo. Starvið er í fyrsta umfari tíðaravmarkað til eitt ár, við møguleika til at gerast varandi starv.

Vit hava eina heila lítla organisasjón til at framleiða og savna hagtøl um eitt breitt úrval av viðurskiftum, sum hava týdning fyri øll. Uppgávan er at geva informasjónini eitt snið ella skap, sum kann gera turr hagtøl áhugaverd, lesiverd og atkomulig hjá øllum.
Hevur tú áhuga í hagtølum, áhuga í informasjón sum heild, hevur tú evnini til at siga eina søgu í tølum og texti, ella royndir av at arbeiða við heimasíðuforritum av ymsum slag, ert tú vælkomin at søkja starvið. Hevur tú útbúgving sum miðlagrafikari ella aðra viðkomandi miðlaútbúgving, er tað ein avgerandi fyrimunur. Royndir í líknandi størvum telja sjálvsagt eisini við í metingina.

Tú kemur at starvast í einari organisasjón, sum hevur til uppgávu at upplýsa um samfelags-viðurskifti sum heild og sum er snikkað til at loysa júst tað uppgávuna. Títt íkast verður at gera hesa informasjón tøka á internetinum við fleiri ymsum amboðum og tillaga ymiskan lesaratørv.
Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Landsstýrið og avvarandi fakfelag.

Umsóknir skulu stílast til Hagstovu Føroya, Glyvursvegur 1, 165-Argir, ella sendast við telduposti til hagstova@hagstova.fo. Umsóknin skal vera okkum í hendi innan 20. septembur og byrjast skal í starvinum skjótast til ber.

Vilt tú vita meira um starvið, ber til at venda sær til Hermann Oskarsson á Hagstovuni, tlf. 352800.

TEAM85

HAGSTOVA FØROYA
GLYVURSVEGUR 1 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR
TLF. +298 35 28 00 · FAX +298 35 28 01 · HAGSTOVA@HAGSTOVA.FO · WWW.HAGSTOVA.FO